Tórshavn, 27-04-2006
J-nr. 200500028
Til rætta viðkomandi

Inngangur til avtalu

Á landsstýrisfundi 2. mai í 2005 tók Landsstýrið undir við at seta í verk mál- og avriksstýring.

Uppskotið til lóg um landsins játtanarskipan setir krøv um mál og avriksstýring. Har verður ásett, at mál- og avriksstýring skal verða nýtt í sambandi við umbøn, játtan og uppfylging av almennum pengum frá fíggjarlóg.

Í nýggju roknskaparkunngerðini í § 5 er m.a. ásett, at allir stovnar skulu seta mál og seta krøv til avrik innan tøka tilfeingið og innan yvirskipað mál, sum hægri myndugleiki hevur sett.

Fyri at fáa gongd á arbeiðið og fyri at samskipa arbeiðsorkuna so væl sum til ber, ráðgevur og vegleiðir Fíggjarmálaráðið um at fyrireika og seta í verk mál- og avriksstýring. Avtalan lýsir innihaldið í og treytirnar fyri veitingum frá Fíggjarmálaráðnum.

Petur Alberg Lamhauge
vegna Fíggjarmálaráðið

# Avtala

millum
Fíggjarmálaráðið

og
(stjórnarráð)

um
tænastuveitingar í sambandi við
at seta í verk nýggja roknskaparkunngerð á

(heiti á stovni/stovnum)

## § 1 Partar

Henda avtala er ein avtala millum Fíggjarmálaráðið og stjórnarráðið um at sesta í verk mál- og avriksstýring á einstøkum stovni/stovnum.

## § 2 Grundarlag

Nú:

1. nýggj løgtingslóg um játtanarskipan verður sett í verk,
2. nýggj roknskaparkunngerð verður sett í verk,
3. avrikssáttmálar skulu verða fyrireikaðir og gjørdir millum stjórnarráð og stovnar
4. almennir stovnar ikki hava siðvenju ella royndir við mál- og avriksstýring,

fer Fíggjarmálaráðið at ráðgeva stjórnarráðum og undirliggjandi stovnum í at seta í verk mál- og avrikstýring.

Endamálið við hesi avtalu er at vegleiða stjórnarráði og stovni at røkka málinum, sum er at mál- og avriksstýring verður brúkt sum eitt vælvirkandi og munadygt leiðsluamboð.

Til at veita hesa ráðgevingartænastu hevur Fíggjarmálaráðið sett ein ráðgevingarbólk. Í honum eru Durita Tausen, Thomas Dam og Jónsvein Joensen.

## § 3 Bygnaður

At stjórna og fyrisita at seta í verk avrikssáttmálar verður skipað soleiðis:

| Tign | Heiti | Manning | Endamál |
|---|---|---|---|
| 1 | Stýringa-bólkur | Løgmanstjórin, aðalstjórin í Fíggjarmálaráðnum og aðalstjórin fyri viðkomandi stjórnarráð. | Endamálið við bólkinum er at tryggja verkætlanina á fyrisitingarliga evsta stigi.<br><br>Uppgávan hjá bólkinum er at seta yvirskipaðar karmar fyri allar verkætlanir undir stjórnarráðnum.<br><br>Bólkurin skal mæla til yvirskipað val og taka støðu til størri ivamál, til dømis um ein verkætlan skal verða steðgað ella ikki. |
| 2 | Verkætlannar-bólkur | Stjórin fyri viðkomandi stjórnarráð; stjórin fyri viðkomandi stovn; ráðgevi frá Fíggjarmálaráðnum. | Endamálið við bólkinum er at tryggja, at verkætlanin hjá stovninum gongur sum ætlað.<br><br>Uppgávan hjá bólkinum er at samskipa verkætlanina á einstaka stovninum. Bólkurin skal góðkenna allar veitingar frá stovninum.<br><br>Bólkurin hevur heimild til at taka støðu í øllum vanligum ivamálum. |
| 3 | Stovnsbólkur | Starvsfólk á viðkomandi stovni, eftir stjórans avgerð. | Endamálið við stovnsbólkinum er at fremja tað virksemi, sum verður kravt av stovninum, í sambandi við at seta í verk mál- og avriksstýring.<br><br>Stjórin kann seta fleiri bólkar, er tað hóskandi. |
| 4 | Ráðgevingar-bólkur | Durita Tausen, Thomas Dam og Jónsvein Joensen. | Endamálið við bólkinum er at veita tær ráðgevingartænastur, sum nevndar verða í hesi avtalu.<br><br>Umframt at ráðgeva, skal hesin bólkurin regluliga boða stýringabólkinum og verkætlannarbólkinum frá um framtøkuna í verkætlanini. |

## § 4 Veitingar frá Fíggjarmálaráðnum

Fyri at kunna fremja einstøku verkætlanirnar á munadyggan hátt, skal hvør stovnur og viðkomandi stjórnarráð seta neyðuga tíð av hjá teimum starvsfólkum, sum eru neyðug til at tilgongdin kann føra á mál.

Fíggjarmálaráðið veitir ráðgevandi tænastuna, men meginreglan er, at fyrireikingar- og útgreiningararbeiðið skulu stovnurin og stjórnarráðið gera. Fíggjarmálaráðið veitir ráðgeving um, hvussu tað kann verða gjørt.

Starvfólk, sum verða sett til at gera fyrireikingararbeiðið, skulu vera so mikið leys av øðrum uppgávum, at kravdu uppgávurnar verða loystar sambært ásettu tíðarætlanini.

Heldur stovnurin ikki sínar skyldur, verður verkætlanin steðgað. Tað er av stórum týdningi, at avger ein stovnur at steðga tilgongdini, at tað so er so tíðliga í umfarinum sum til ber.

Til hvørja einstaka verkætlan, sum fevnir um at seta mál- og avriksstýring í verk á einum stovni, veitir Fíggjarmálaráðið hesa tænastu:

| Stig | Tiltak frá Fíggjarmálaráðnum | Virksemi á stovninum | Veiting |
|---|---|---|---|
| 1 | **<u>Kickoff-seminar</u>**<br>Seminar um mál- og avriksstýring fyri stjórnarráði og stovni.<br><br>Roynt verður at laga seminarið eftir stovninum, sum er við í verkætlanini. | Áðrenn tiltakið verður hildið, skulu stovnur og stjórnarráð hava:<br><br>a) gjørt sínamillum avtalu um at seta í verk mál- og avrikstýring.<br><br>b) avgjørt, hvørji fólk skulu vera í bólkinum, eftir bygnaðinum í § 3. | Miðað verður eftir, at øll í verkætlanini fáa<br><br>a) felags fatan av, hvat skal fara fram í verkætlanini.<br><br>b) nóg holla vitan um grundleggjandi hugtøk, sum skulu verða nýtt í verkætlanini. |
| 2 | **<u>Fyriskipan</u>**<br>Verkstova um at áseta partar í verkætlan og tíðarætlan<br><br>Avrik frá verkstovuni er, at Fíggjarmála-ráðið greiðir frá krøvum og ynskjum til eina yvirskipaða | Eftir tiltakið skal stovnsbólkurin gera eina yvirskipaða tíðar- og arbeiðsætlan fyri, hvussu mál- og avriksstýring skal verða sett í verk á stovninum. | Stovnsbólkurin skal gera tíðar- og arbeiðsætlan.<br><br>Tíðar- og arbeiðsætlanin skal verða løgd fyri ráðgevingarbólkin at umrøða. |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | tíðar- og arbeiðsætlan. | | Verkætlanarbólkurin skal hava góðkent tíðar- og arbeiðsætlanina. |
| 3 | **<u>Lýsa stovn og áhugapartar</u>**<br>Verkstova um at lýsa stovnin og umhvørvið, sum stovnurin virkar í.<br><br>Avrik frá verkstovuni er, at Fíggjarmála-ráðið greiðir frá endamáli við lýsingunum, og amboðum at fremja lýsingarnar við. | Eftir tiltakið skal stovnsbólkurin neyvt lýsa virksemið hjá stovninum eftir hvørjir uttanhýsis og innanhýsis áhugapartarnir eru.<br><br>Stjórnarráðið er við í hesum arbeiðinum, alt eftir sum tað er hóskandi. | Stovnsbólkurin skal lýsa stovnin eftir hvørjir áhugapartarnir eru.<br><br>Lýsingin skal verða løgd fyri ráðgevingar-bólkin at umrøða.<br><br>Verkætlanarbólkurin skal góðkenna lýsingina. |
| 4 | **<u>Missión og visjón hjá stovninum</u>**<br>Verkstova um at lýsa tilverugrundarlag stovnsins (missión), og hvussu hetta verður rokkið við framtíðini í huga og við langtíðarmálum (visjón).<br><br>Serlig atlit verða tikin til at missión og visjón hjá stovnum kunnu verða broytt, og at virksemi stovnsins skal tá verða umhugsað av nýggjum, fyri at samsvara við nýggju missiónina og nýggjar visjónir. | Eftir tiltakið skal stovnsbólkurin lýsa missión og visjón (langtíðarmál) fyri stovnin.<br><br>Stjórnarráðið er við í hesum arbeiðinum, alt eftir sum tað er hóskandi. | Stovnsbólkurin skal lýsa missión og visjón fyri stovnin.<br><br>Lýsingin skal verða løgd fyri ráðgevingar-bólkin at umrøðu.<br><br>Verkætlanarbólkurin skal góðkenna lýsingina. |
| 5 | **<u>Lýsa uppgávu-stigveldi</u>**<br>*(da: opgave-hierarki)*<br>Verkstova um at lýsa uppgávustigveldi fyri stovnin. | Eftir tiltakið skal stovnsbólkurin gera eina lýsing av uppgávustig-veldinum á stovninum. | Stovnsbólkurin skal gera eina lýsing av uppgávustigveldi fyri stovnin. |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Sí vegleiðing frá Føroya Gjaldstovu um mál- og avrikstýring. | Stjórnarráðið er við í hesum arbeiðinum, alt eftir sum tað er hóskandi. | Lýsingin skal verða løgd fyri ráðgevingar-bólkin at umrøða.<br><br>Verkætlanarbólkurin skal góðkenna lýsingina. |
| 6 | **<u>Mál fyri stovnin og innaneftirlit</u>**<br>Verkstova um at seta hóskandi mál fyri stovnin.<br><br>Týðandi partar av verkætlanini viðvíkja<br><br>a) hvørjir áhugapartar kunnu seta mál fyri stovnin<br><br>b) at mál skulu kunna verða mátað.<br><br>c) at seta í verk innaneftirlit, til tess at tryggja førleika at máta, um málini verða rokkin ella ikki. | Eftir tiltakið skal stovnsbólkurin gera eina lýsing av málum og tilhoyrandi innaneftirliti á stovninum.<br><br>Stjórnarráðið er við í hesum arbeiðinum, alt eftir sum tað er hóskandi.<br><br>Tað hevur stóran týdning, at til ber at máta málini, og at eintýdd máting kann staðfesta, um mál er rokkið ella ikki. | Stovnsbólkurin skal lýsa mál fyri stovnin 6-12 mánaðir fram.<br><br>Stovnsbólkurin skal lýsa mátipunkt og hóskandi innaneftirlit, fyri at málini kunnu verða mátað.<br><br>Lýsingin skal verða løgd fyri ráðgevingar-bólkin at umrøða.<br><br>Verkætlanarbólkurin skal góðkenna lýsingina. |
| 7 | **<u>Avrik og innaneftirlit við avrikum</u>**<br>Verkstova um at áseta avrik fyri stovnin, og um at máta virksemi á stovninum samborið við avrikskrøv. | Stovnsbólkurin skal gera eina lýsing av, hvørji (stovnar/deildir/funktiónir) skulu avrika hvørji avrik í uppgávu-stigveldinum, fyri at tryggja, at málini verða rokkin.<br><br>Somuleiðis skal ein lýsing vera av, hvørjar skipanir skulu verða fingnar til vega ella verða broyttar fyri at kunna máta avrikini nóg væl. | Stovnsbólkurin skal<br>a) gera uppskot til mál- og avrikssáttmála millum stovn og stjórnarráð,<br>b) gera uppskot til stjórasáttmála millum stjóra og stjórnarráð,<br>c) yvirskipað lýsa krøv til skipanir, ið skulu verða broyttar og tillagaðar.<br><br>Lýsingin skal verða løgd fyri ráðgevingar-bólkin at umrøða.<br>Útkast og lýsingar eru |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | | innanhýsis arbeiðsskjøl hjá stovninum, og skulu tí ikki verða løgd fyri verkætlannarbólkin at góðkenna. |
| 8 | **<u>Avriksavtalur</u>**<br>Fundir millum a) stovnsleiðara og ráðgevar og b) aðalstjóra og ráðgevar. Fundarvirksemi til ráðgeving í sambandi við at fyrireika avriksavtalur. Hvør stovnur fær eitt avtalað tímatal til ráðgeving í sambandi við at fyrireika avriksáttmála. Hvør stjóri ger sjálvur av, um hann nýtir hesa tænastu ella ikki. | | |
| 9 | **<u>Uppfylging</u>**<br>Tvær verkstovur.<br><br>Endamálið er at tryggja, at mál- og avriksstýring veruliga virka, tá verkætlanin fyri stovnin er av.<br><br>Verkstovur, sum verða hildnar eftir at avrikssáttmálar eru gjørdir, eru:<br><br>a) 6 mánaðir eftir, at avrikssáttmáli er gjørdur, verður ávegis kanning gjørd fyri at tryggja, at avtalað innaneftirlit verður sett í verk<br><br>b) 12 mánaðir eftir, at avrikssáttmáli er gjørdur, verður ein neyvari kanning gjørd.<br><br>Sí gjøllari lýsing av hesum í vegleiðing frá Føroya Gjaldstovu. | Stovnsbólkurin skal til hvørja verkætlan<br><br>a) eftirmeta verkætlanina<br><br>b) støðulýsa, hvat arbeiði er framt, sambært ásetingum um innaneftirlit og ásetingum í avrikssáttmálum<br><br>c) lýsa ætlanir fyri, hvussu óloystar uppgávur skulu verða loystar. | Stovnsbólkurin eftirmetir og lýsir framt og ætlað virksemi, sum stendst av verkætlanini.<br><br>Tilfarið skal verða lagt fyri ráðgevingarbólkin at umrøða.<br><br>Verkætlanarbólkurin skal góðkenna lýsingarnar. |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 10 | **<u>Projektleiðsla</u>**<br>Ráðgevingarbólkurin metir regluliga um, fyri verkætlannar- og stýringabólk, hvussu gongur við verkætlanunum. | Regluligir projektleiðslufundir.<br><br>Stovnsbólkurin og ráðgevingarbólkurin skulu halda regluligar projektleiðslufundir fyri at meta um, hvussu gongur við verkætlanini, samanborið við ásetta arbeiðs- og tíðarætlan. | Ráðgevingarbólkurin ger regluliga støðufrágreiðing um verkætlanina til verkætlannarbólk og stýringabólk.<br><br>Hvussu ofta tað verður gjørt, ásetur verkætlannarbólkurin fyri hvørja verkætlan sær. |

**§ 5 Aðrar veitingar**

Stovnur og stjórnarráð kunnu biðja eksternar ráðgevar um hjálp í sambandi við verkætlanina.

Kostnaður fyri at nýta eksterna ráðgeving skal stovnurin rinda, eftir avtalu millum stovn og ráðgevar.

**§ 6 Almennar treytir**

Fíggjarmálaráðið rindar fyri ráðgevingartænasturnar, ásettar í hesi avtalu. Fíggjarmálaráðið tilskilar sær tí rætt at siga upp avtaluna, verða avtalaðar veitingar í verkætlanini ikki framdar eftir ætlan.

Allir partar hava rætt at siga upp avtaluna, um stýringabólkur avger at steðga einstakari verkætlan.

Eru ósemjur um orðingar í hesi avtalu, er útlegging hjá Fíggjarmála-ráðnum avgerandi.

**§ 7 Ígildiskoma**

Avtalan kemur í gildi, tá ið báðir partar hava skrivað undir:

(aðalstjóri)
fyri (stjórnarráð)

Petur Alberg Lamhauge
fyri Fíggjarmálaráðið